## Sviar dømdir fyri njósning

Ein dómstólur í Iran hevur dømt tveir svenskar ríkisborgarar trý ára fongsul, tí teir høvdu tikið myndir av iranskum herstøðum, skrivar AP. Tað var Jamal Karimirad, innanríkisráðharrri, sum kunngjørdi dómin, men hann vildi ikki siga meiri um málið.

Svenskir fjølmiðlar skriva, at teir báðir vinmenninir blivu tiknir, tí teir høvdu tikið myndir av bygningum hjá iranska herinum á oynni Qeshm, sum er í Hormuzsundinum. Sambært svensku tíðindastovuni TT vóru menninir farnir til Iran at arbeiða innan byggivinnuna.

Verjin hjá sviunum segði við svenska sjónvarpið í gjárkbøldið, at dómurin er ov harður, tí talan var als ikki um njósning. Svenskir myndugleikar vilja ikki gera nakrar viðmerkingar, fyrr enn teir hava nærlisið eina rætta týðing av dóminum, sigur Christian Carlsson, talsmaður hjá uttanríkisráðnum í Stockholm, við TT.

## Ætlar at hitta Abbas


*Ehud Olmert skal hitta Mahmoud Abbas.*

Síðani Hamas vann palestinska valið í januar, hevur einki samband verið ímillum ísraelskar og palestinskar myndugleikar, men nú sigur ísraelski forsætisráðharrin, Ehud Olmert, at hann ætlar sær at tosa við palestinska forsetan, Mahmoud Abbas.

Abbas hevur alla tíðina sagt, at ísraelsmenn og palestinar eiga at hava samband við hvør annan, sjálvt um Hamas hevur stjórnarvaldið í teimum palestinsku økjunum. Ein talsmaður hjá ísraelsku stjórnini segði í gjár, at Olmert er sinnaður at hitta Abbas, men at hann fer ikki at tosa við umboð fyri Hamas-stjórnina.

Ísrael hevur fyrr sagt, at landið fer ikki at samráðast við Abbas um frið, so leingi Ísrael er í stríði við Hamas, men Ehud Olmert hevur kortini sagt, at tað ber til at varðveita sambandið við palestinska forsetan, sum sum er sinnaður at samstarva við ísraelsmenn í royndunum at skipa eitt palestinskt ríki. Tað vil Hamas harafturímóti ikki.

## Óvitandi amerikanarar

Hóast amerikanskir hermenn hava verið í kríggi í Irak í trý ár, dugir helmingurin av ungum amerikanarunum ikki at siga, hvar í Miðeytsri Irak er.

Tað kemur fram í einari kanning, sum National Geographic hevur gjørt. Tey ungu, sum eru ímillum 17 og 24 ár, fingu eitt kort av Miðeystri, men bara 40 prosent dugdu at siga, hvar á kortinum Irak var. Bara 25 prosent vistu, hvar Ísrael er. Tey fingu eisini eitt kort av Asia, og tá vísti tað seg, at næstan 50 prosent vistu ikki, hvar India er. Tá tey so vórðu spurd um tann harða jarðskjálvtan, sum kravdi 70.000 mannalív í Pakistan í oktober í fjør, vísti tað seg, at tveir triðingar av teimum høvdu als ikki hoyrt um skjálvtan.

Stjórin í National Geographic, John Fahey, sigur úrslitið av kanningini vera skelkandi, og tí fer National Geographic at taka stig, sum skulu bøta um kunnleikan hjá teimum ungu í USA.

## Var við barn

Nógv fólk í Sveis gjørdust í øðini, tá tað frættist, at skíðstjørnan Corinne Rey-Ballet var vorðin myrd saman við bróðuri sínum sunnudagin, og øðin gjørdist ikki minni í gjár, tá tað frættist, at hon var við barn

Sveisiska løgreglan veit ikki við vissu, hvør myrdi tey bæði, at í gjárkvøldið kunngjørdu myndugleikarnir, at teir sóknast eftir fyrrverandi manni hennara, Gerald Stadler. Eygnavitni hava greitt løgregluni frá, at tey sóu hann á drápsstaðnum sunnudagin, og at hann hevði eina skammbyrsu í hondini.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Datt niður í Svartahavið

**Øll tey 113, sum vóru við armenska flogfarinum, doyðu, tá tað datt niður í Svartahavið.**

FLOGVANLUKKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*


*Russiskir bjargingarmenn vóru skjótir á vanlukkustaðið.*

Flogfarið var á veg úr armenska høvuðsstaðnum Jerevan til russiska frítíðarplássið Sotsji við Svartahavið. Tá tað skuldi seta seg á flogvøllinum við býin Adler, var veðrið so vánaligt, at tað fekk ikki sett seg. Flogskiparin gjørdi av at royna eina ferð afturat, men klokkan 02.15 lokala tíð hvarv flogfarið brádliga av radaranum á flogvøllinum. Tað var tá einar seks kilometrar frá flogvøllinum.

Russisku myndugleikarnir sendu alt fyri eitt bjargingarlið at leita, og tíðliga í morgun kunngjørdi innanríkisráðið í Moskva, at bjargingarliðini høvdu funnið likamslutir, bjargingarvestar og ymisk petti av flogfarinum í Svartahavinum.

Seinni upplýsti talsmaðurin hjá innanríkisráðnum, at 26 fólk vóru funnin deyð. Eingin teirra var í bjargingarvesti, og tað verður tikið sum tekin um, at flogfarið er dottið niður brádliga, og at flogskipararnir hava ikki fingið stundir at siga ferðafólkunum frá.

Svartahavið er rættiliga djúpt, har vanlukkan hendi, og russisku myndugleikarnir siga, at vrakið liggur helst á 450 metra dýpi. Tí vórðu boð send eftir einum serligum kavbáti hjá herflotanum, og hann skal royna at bjarga tí svarta kassanum úr vrakinum.

Á middegi kunngjørdu myndugleikarnir, at 26 russar, ein ukraini, ein georgi vóru í flogfarinum. Øll hini vóru armenar. Armenska flogfelagið Amravia átti flogfarið, sum var av slagnum Airbus 320. Sambært Itar Tass var varastjórin í felagnum ímillum ferðafólkini.

# Milliónir av nýføðingum doyggja

**Á hvørjum ári doyggja fýra milliónir børn fáar dagar eftir, at tey eru komin í heimin.**

BARNADEYÐI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Uttan fyri eina læknastøð í Etiopia situr ein 13 ára gomul genta og rurar lítla beiggja sínum, sum er deyðanum nær av svongd. Eygu hansara stara tóm út í luftina, og hann er púra máttleysur.

Lítli Nemo er ein av fleiri milliónum, sum eru meint rakt av matvørutroti í eystara parti av Afrika. Mamma hansara roynir at forvinna til lívsins uppihald við at selja við, og tað gevur henni einar 40 krónur um mánaðin. Sjálv er hon ógvuliga veik og hevur onga mjólk til sonin.

Í teimum afrikonsku londunum sunnan fyri Sahara fáa 30 milliónir fólk ov lítið at eta, og í Eysturafrika eru 15,5 milliónir í neyð. Sum altíð eru tað børnini, ið verða meinast rakt.

Læknatíðarritið Lancet skrivar í sínari seinastu útgávu, at á hvørjum ári doyggja fýra milliónir nýføðingar, og at 3,2 milliónir onnur verða deyðfødd. Í nógvum londum verða hesi als ikki skrásett.

Herfyri kunngjørdi barna_ hjálpargrunnurin hjá ST, UNICEF, eina frágreiðing, sum sigur, at kring heimin eru 146 milliónir børn undir fimm ár, sum hava ov lítið til matna. Tað svarar til 27 prosent av øllum heimsins børnum, skrivar NTB.

Ítróttarsosialurin
– vit eru har tað hendir
